# Útbjóðing

Vegna Klaksvíkar kommunu verður arbeiðið at gera atkomu- og útstykkingarveg vestanfyri Helnabrekkuvegin boðið út alment.

Arbeiðið umfatar í stórum: jørð-, kloakk-, betong-, og asfaltarbeiði. Atkomu- og útstykkingarvegurin er 320 m.

Útbjóðingartilfarið fæst frá fríggjadegi 11. februar 2005, við at gjalda kr. 2.000,- í veð á konto 4096023 í Norðoya Sparikassa í seinasta lagi mánadagin 14. februar og venda sær til undirritaða við váttan um, at upphæddin er goldin.

Boðini skulu vera í afturlatnum brævbjálva, merktur

**Vegur eystanfyri Helnabrekkuvegin**

Lisitatiónin verður mánadagin 7. mars 2005 kl. 15.00 á Teknisku umsiting hjá Klaksvíkar Kommunu.

Boðini verða tá latin upp, og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

**Sámal Johannesen**
Ráðgevandi verkfrøðingur
Geilin 22 · FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 82 28 · Fax 45 82 29

# Ognir úr konkurs-búgvi til sølu

Við hesum verða ognirnar hjá Sp/f 2000 í konkurs lýstar til sølu. Talan er um fylgjandi ognir:

Bilur av merkinum BMW 525 TDS, árgang 1991. Bilurin krevur ábøtur.

20-fót bingja úr stáli, ið er umbygd og innrættað til hússkúr/skrivstovuskúr. Bingjan er frá 2003.

14 spreingimáttur í 3 ymsum støddum.

Áhugaði kunnu venda sær til Jóhan J. Lamhauge, adv. ft.

**Advokatfelagið**
Yviri við Strond 4 · Boks 359
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 · Fax 311261

| | |
|---|---|
| Tórmó›ur Djurhuus, adv. | Jógvan Páll Lassen, adv. |
| Petur Even Djurhuus, adv. | Jógvan E. Ellefsen, adv. |
| Anna Dam, adv. | Ingi Højgaard, adv. |

# Aðalfundur

Vágs pensjónistafelag hevur aðalfund

**mánadagin 28. februar 2005 kl. 19.00**

í hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag.

Aftaná aðalfundin verður vanligur limafundur.

**Formaðurin**

# Skeið 2005



## Lær at seyma vest til føroyskan búna (Vikuskiftisskeið)

4.-8. apríl.
Skeiðið er allar dagarnir frá kl. 9-16.
*Undirvísari:* Jenny Kastalag.
Kostnaður fyri skeiðið er kr. 1000,-.
Íroknað mat, ikki tilfar.

## Lær at seyma buksur til føroyskan búna (Vikuskiftisskeið)

11.-12. mars, 18.-19. mars.
Skeiðið er fríggjakvøld kl. 19-22
og leygardag kl. 9-16.
*Undirvísari:* Malena Andreassen.
Kostnaður fyri skeiðið er kr. 700,-.
Íroknað mat, ikki tilfar.

## Skeið í maskinbinding (Vikuskiftisskeið)

Skeiðið er bæði fyri núbyrjarar og víðarikomin. Møguleiki er fyri at læra at gera liðug pløgg, ið skulu tøvast, og at binda í meturmál til at tøva.

6.-7. mei
Skeiði er fríggja og- leygardag kl. 9-16.

12.-14. mei
Skeiði er hóskvøld kl. 19-22 og fríggja- og leygardag kl. 9-16.

*Undirvísari:* Elspa Petersen.
Kostnaður fyri skeiðið er kr. 1500,-.
Íroknað mat, ikki tilfar.

## Lær at tøva ull og evna til ymiskt (Vikuskiftisskeið)

*(Dømi: sjal, húgvur, hattar, vøttir, skóleistar, turriklæð o.a)*
8.-9. apríl, 15.-16. apríl.
Skeiðið er fríggjakvøld kl. 19-22 og leygardag kl. 9-16.
*Undirvísari:* Guðrun Elttør.
Kostnaður fyri hvørt skeiðið er kr. 600,-.
Íroknað mat, tilfar kann keypast frá skúlanum.

## Skeið í matvørureinføri (Dagskeið)

Skeiðið er ætla fólkum sum arbeiða við mati á stovnum, kantinum o.ø

*Undirvíst verður í:*
*Matgerð og goymslu:* Hitaviðurskifti, bakteriuvøkstur, bakteriusløg, dálkan og krossdálkan.
*Reingerð:* Reingerðsevni og goymsla, reingerð og reingerðsætlan.
*Persónligt reinføri:* Klæðir og annað.

Skeiðið er mánadagin 18. apríl, kl. 9-16.
*Undirvísarar:* Elisabeth Akursmørk.
Kostnaður kr. 1000,-.
Íroknað mat, ikki tilfar.

## Brodering til føroysk klæðir (Vikuskeið)

Frálæra verður givin í at tekna mynstur til fyriklæð og turriklæð, til føroysk klæði úr føroysku floru, í brodering og montering. Møguleiki er eisini at brodera og at tekna mynstur til ymiskt annað, so sum gardinur og dúkar.

Skeiðið er frá 25. til 29. apríl, kl. 9-16. Tó fríggjadag til kl. 15.
*Undirvísari:* Jutta Hansen.
Kostnaður fyri skeiðið er kr. 1200,-.
Íroknað mat, ikki tilfar.

## Heilsugóður matur/ymiskt handarbeið (Vikuskeið)

Frálæra verður givin í heilsugóðum mati ymiskum handarbeiði, so sum silkimáling, brodering, føroysk bond, seyming, útferð o.a.

*Undirvísarar:* Jutta Hansen, Paulina Eliasen, Jenny Kastalag og Elisabeth Akursmørk.
Skeiðið er frá 30 mei. til 3. juni.
Skeiðið er eitt vistarskeið.
Kostnaður fyri skeiðið er kr. 1600,-.
Íroknað mat og gisting.

***Tilmelda skal verða í seinasta lagi 1 viku áðrenn skeiðið byrjar. Møguleiki er fyri at gista á skúlanum, til øll skeiðini.***

***Til handarbeiðskeiðini er ikki neyðugt at hava seymimaskinu við. Skúlin hevur øll seymiamboð.***

***Fleiri upplýsingar um skeiðini, fáast við at venda sær til skúlan. Viðmerkjast skal, at tað er avmarkað luttøka til øll skeiðini.***

**HÚSARHALDSSKÚLI FØROYA**

**Stoksoyrarvegur 29 · FO-700 Klaksvík**
**Tlf. 456974 · www.husarhaldsskulin.fo · hsf@post.olivant.fo**

VAST1457171